## Gongutúrur norð á Skarð

**Um viðrar skipar Norðoya Kunningarstova fyri gongutúri norð á Skarð sunnudagin 16. mai**

GONGUTÚRUR
*tíðindaskriv*

Gongutúrar av ymsum slag eru vorðnir alt meira vanligir seinnu árini, og sunnudagin er tað so ferðavinnan í Norðoyggjum, sum skipar fyri.

Í tíðindaskrivi verður sagt frá, at tað Andrass Sólstein, sum verður ferðaleiðari og frásøgumaður á ferðini, sum alt í alt fer at taka góðar fýra tímar.

Farið verður úr Haraldssundi kl. 13.00, og afturkomin er ætlanin, at luttakararnir fara inn í bygdarhúsið Ljósið, at rinda møðina, eins og ætlanin her eisini er at leggja lunnar undir einum veruligum gongufelag.

Kunningarstovan heitir annars á áhugaði um at minnast til at klæða seg eftir veðrinum, at hava góðar skógvar og at hava nakað av mati við.

## Nógv vilja skriva

**28 handrit eru innkomin til skaldsøgukappingina, sum Listastevna Føroya skipar fyri**

HANDRITAKAPPING
*tíðindaskriv*

Skrivandi føroyingar hava tikið ómetaliga væl ímóti avbjóðingini, sum Listastevna Føroya gav teimum við at útskriva skaldsøgukapping. Freistin at senda inn handrit til skaldsøgukappingina varð úti leygardagin 1. mai, og inn eru komin heili 28 skaldsøguhandrit!

Nú fer dómsnevndin til verka at meta um tey innsendu handritini. Kunngjørt verður setanardagin, fríggjadagin 6. august, hvør ið fær virðislønarheiðurin og tær 150.000 krónurnar fyri besta skaldsøguhandritið.

Í dómsnevndini sita: Katrin Næs, studentaskúlalærari, Turið Kjølbro, cand. phil í norðurlendskum bókmentum og Bergur Hansen, mag.art í norðurlendskum bókmentum. Dómsnevndin skilar sær rætt til onga virðisløn at lata.

Listastevnan hevur á hvørjum ári skrivað út bókmentunarligar kappingar:

Til fyrstu Listastevnuna í 2001 varð bjóðað til kapping at skriva stuttsøgur.

39 stuttsøgur komu inn og tríggjar virðislønir vórðu tá latnar: Fyrsta virðislønin fór til Hanus Kamban fyri søguna »Angels Place«, onnur virðislønin fór til Marjun Kjelnæs fyri søguna »Kópakona« og triðju virðislønina fekk Niclas Rasmussen fyri søguna »Fyri lív, eftir deyða«. Vinnandi søgurnar og hinar, sum komu inn, vórðu givnar út í bók »Mjørki í heilum«, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags stóð fyri. Vinnandi stuttsøgurnar og fleiri aðrar vóru haraftur-at at hoyra í Útvarpi Føroya.

Til aðru Listastevnuna í 2002 varð bjóðað til kapping at skriva handrit til útvarpsleik. 10 Leikrit komu inn. Ein virðisløn áljóðandi 50.000 kr. varð latin fyri besta handritið. Virðislønina fekk Marjun Kjelnæs fyri handritið til útvarpsleikin »Trongd«, sum Útvarp Føroya sendi, tá ið Listastevna Føroya 2002 varð sett. Eyðun Johannesen legði útvarpsleikin til rættis.

Triðju ferð bjóðaði Listastevna Føroya til kapping at skriva nýggjar, føroyskar yrkingar til Listastevnu Føroya 2003. 126 fólk sendu inn 446 yrkingar. Yrkingarnar vórðu virðisløntar við 5.000 kr. fyri hvørja av teimum 11 bestu yrkingunum og vórðu hesar lisnar upp í Útvarpi Føroya allar dagarnar á Listastevnuni – ein yrking um dagin, meðan Listastevnan stóð 7. - 17. august 2003.

Úr Tokio til Havnar á oljuráðstevnu:

# Japanskt oljufelag sær møguleikar í Føroyum




*Shutaro Hasegawa kom beinleiðis úr Tokio fyri at vera við á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum*

*Mynd Jan Müller*

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Millum mongu útlendsku oljufólkini, sum høvdu leitað sær til oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í farnu viku var eisini Shutaro Hasegawa, stjóri í stóru japonsku oljufyritøkuni "Idemitsu". Hann var komin alla leiðina úr Tokio til Havnar fyri at hoyra, hvat altjóða serfrøðingar høvdu at siga um framtíðar møguleikarnar at finna olju og gass á føroyska landgrunninum.

Idemitsu arbeiðir í størum parti av Asia, serstakliga við at selja olju. Felagið er tó farið at vísa áhuga fyri oljuleiting og framleiðslu eisini og er í dag við á norska landgrunninum, har tað hevur lut í Snorrefeltinum. Felagið hevur skrivstovu í Oslo.

Nú verður so roynt at hyggja eftir økjum í eitt nú Europa, har møguleikar eru fyri at finna olju. Og her hevur leiðslan í felagnum so útpeikað sær Atlantsmótið, og her m.a. føroyska landgrunninum, sum eitt av sínum týðandi miðjum.

– Hetta hava verið tveir sera áhugaverdir dagar í Føroyum, har vit eisini hava fingið staðfest tað vit longu vistu frammanundan, nevniliga, at føroyska undirgrundin uttan iva goymir bæði olju og gass sigur Shutaro Hasegawa. Hann vísir serstakliga á tað sera positiva í, at í undirgrundini við Føroyar finst keldugrýti, sum er sjálv høvuðsfortreytin fyri í heila tikið at finna olju og gass. Nú verður so roynt at finna fram til, um allar hinar fortreytirnar, so sum at finna egnað reservoir og tak, eisini eru til steðar. Tað er hetta komandi kanningarnar av fláunum undir basaltinum, skulu vísa. Og tað eru hesar kanningar, sum japanska oljufelagið ætlar sær at fylgja við í.

Sjálvur er Shutaro Hasegawa sera bjartskygdur um føroyaøkið, og hann útilokar ikki, at japanska felagið fer at vera við í 3. útbjóðing á landgrunninum, nær hon so enn verður. Men felagið fylgir væl við gongdini í 2. útbjóðing eisini, tó at tað ikki hevur gjørt av at vera við.

– Eg eri ikki í iva um, at Føroyar fara at gerast ein framtíðar oljulandslutur, soleiðis sum allar tær upplýsingarnar vit hava fingið innlit í síggja út. Japanska felagið fer nú at fylgja væl við útviklinginum við Føroyar frá skrivstovuni í Oslo.

## Altjóða dagur hjá sjúkrarøktarfrøðingum

TÍÐINDASKRIV

Mikudagurin 12. mai er altjóða dagur hjá Sjúkrarøktarfrøðingum. Í hesum sambandi skipar Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fyri limafundi fyri sjúkrarøktarfrøðingum og lesandi.

Siri Stenberg, Heilsufrøðingur fer at greiða frá, um granskingarverkætlan sína í heilsufrøðiskipanini í Suðuroyar norðaru helvt.

Siri fer at greiða frá endamálinum við kanningini, ið er at fáa eina greiða ábending um núverandi støðuna, og tískil eitt grundarlag fyri, hvussu tað heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi arbeiði kann tilrættisleggjast og raðfestast. Her verður hugsað um støðuna hjá smábørnum, familjum teirra, og um fyritreytirnar hjá teimum, ið arbeiða innan smábarnaøki, sæð út frá einum fysiskum, socialum og sálarfrøðiligum sjónarringi. Harumframt skal kanningin vera grundarlag fyri, eisini í framtíðini at skjalprógva hvørt heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi arbeiði virkar eftir ætlan.

Endamálið er eisini, at kanningin kann nýtast sum grundarlag fyri einum víðari arbeiði, til at dokumentera og analysera støðuna innan hendan táttin av heilsuøkinum, bæði í Føroyum og sammett vit onnur lond. Í so máta er kanningin ætla sum grundarlag, ið arbeiðast kann víðari við. Royndirnar og úrslitini, ið spretta av kanningini kunnu sostatt koma einum framtíðar arbeiði til góðar.

Limafundurin hjá " Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar" verður á Hotel Hafnia 12. mai kl. 19.00.



Álitið frá Løgtingsins fíggjarnevnd:

# Umfatandi skerjingar á fíggjarlógini

**Mikudagin í farnu viku legði fíggjarnevndin fram tær broytingar, sum skulu gerast á fíggjarlógini fyri árið 2004. Millum annað skal skerjast í sjúkrahúsverkinum, og játtanin til tey heimleysu verður strikað. Atkvøtt varð í Løgtinginum týsdagin, altso í gjár**

FÍGGJARLÓG
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, legði tann 25.mars fram fyri tingið uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri árið 2004. Fyrsta viðgerð í Løgtinginum var teir báðar síðstu dagarnar í mars, og síðani varð uppkotið beint í fíggjarnevndina, sum nú er liðug við sítt arbeiði.

Sjey limir eru í fíggjarnevndini, og tað er Fólkaflokkurin sum saman Anfinni Kallsberg eigur formanssessin. Næstformaður er Vilhelm Johannesen úr Javnaðarflokkinum, og umboð fyri andstøðuna eru Páll á Reynatúgvu og fyrrverandi landsstýrismaðurin við fíggjarmálum Karsten Hansen, umframt Kári P. Højgaard.



*Anfinn Kallsberg er formaður í Løgtingsins fíggjarnevnd, sum nú hevur kunngjørt álitið um broytingar í fíggjarlógaruppskotinum hjá Føroya Landsstýri*

### Púra samd fíggjarnevnd

Tað er ein samd fíggjarnevnd, sum er liðug at viðgera fíggjarlógaruppskotið hjá Bárði Nielsen og Føroya Landsstýri. Tað vil við øðrum orðum siga, at bæði samgongu- og andstøðutinglimir í fíggjarnevndini hava allir atkvøtt fyri broytingunum, og teir skriva eisini undir allar tær viðmerkingar, sum nevndin hevur til Føroya Landsstýri.

Og viðmerkingarnar eru fleiri í tali, áðrenn sjálvar broytingarnar koma. Fíggjarnevndin metir millum annað, at "teir landsstýrismenn, sum ikki til komandi fíggjarlóg hava fingið eitt nøktandi lógargrundar-lag til umbønir um stuðulsjáttan, ikki kunnu vænta at fáa viðmæli frá fíggjarnevndini."

### Í stríð við stýrisskipanarlógina

Fíggjarnevndin tekur her støði í teimum eygleiðingum, sum løgtingsgrannskoðararnir og løgtingsnevndirnar nú í fleiri ár hava gjørt, uttan at nakað er tikið til eftirtektar.

Fíggjarnevndin viðmerkir eisini í nýggja álitinum, at ávísir grunnar og landsstovnar ikki eru tiknir við á fíggjarlógina, og at hetta "er í stríð við stýrisskipanarlógina."

### Ivi um samsvar er við játtanarskipanina

Nevndin metir, at tað er Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, sum hevur ábyrgdina av at betra um hesi viðurskiftini, og at fáa tey upp á pláss.

Harumframt finst fíggjarnevndin at teimum peninga-flytingum, sum eru millum almennar stovnar. Fíggjarnevndin ivast nevniliga í "um hesar flytingar eru í samsvari við játtanarskipanina." Tað verður mett, at teir stovnarnir, sum fáa pening játtaðan, skulu ikki flyta pening aðrastaðni.

Fíggjarnevndin sigur í hesum sambandi, at tað eru landsstýrismennirnir, sum "eiga at leggja størri dent á hesa upplýsingarskyldu yvir fyri Løgtinginum." Aftur her metir fíggjarnevndin, at tað er Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, sum "eigur at síggja til" at hesi viðurskiftini verða "mundi batnað."



*5. mai kunngjørdi fíggjarnevndin álitið um broytingar í fíggjarlógini*

## Broytingarnar hjá fíggjarnevndini

Fíggjarnevndin hevur gjørt umfatandi broytingar í uppskotinum hjá Føroya Landssýri. Talan er um broytingar upp á tilsamans 94 milliónir krónur. Útreiðslurnar skulu minkast, og inntøkurnar skulu hækkast. Tær mest áhugaverdu broytingarnar skulu vísast á niðanfyri.

**Løgtingsins umboðsmaður fær minni**
Sagt verður í broytingarálitinum frá fíggjarnevndini, at til ber at minka hesa konto við kr. 300.000.

**Fýra milliónir minni til rentustuðul**
Fíggjarnevndin metir ikki, at nøkur størri rentuhækking er væntandi, og tískil verður játtanin minkað við kr. 4.000.000. Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur longu boðað frá, at hann væntar eina rentuhækking, og neyðugt tískil verður við eykajáttan, sigur hann.

**Minni til Fiskiveiðueftirlitið**
Fíggjanevndin metir, at tað ber til at minka um játtanina til Fiskiveiðueftirlitið og Vaktar- og Bjargingartænastuna við kr. 2.000.000, uttan at tað fer at ávirka raksturin.

**Lægri játtan til fiskivinnumenning**
Skorið verður við einari millión, tí fíggjarnevndin metir ikki, at brúk verður fyri allari játtanini, tí árið er hálvrunnið. Harumframt sigur nevndin í álitinum, at landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, eigur at endurskoða lógina.

**Fýra milliónir minni til teir luftbornu**
Fíggjarnevndin metir, at Løgtingið kann ikki játta pening til eina ætlan hjá Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya, sum tað ikki kennir til fulnar. Ætlanin er, at hesir stovnarnir skuldu nýta fleiri enn 40 milliónir krónur, men nevndin sigur, at um "landsstýrismaðurin metir, at neyðugt er at halda fram við eini ætlan, má hann leggja hesa ætlan fyri Løgtingið."

**Skerjast skal í sjúkrahúsverkinum**
Fíggjarnevndin hevur skorið 3 milliónir krónur í játtanini til sjúkrahúsverkið. Nevndin metir samstundis, at tað innanfyri hesar fíggjarkarmar er gjørligt at byrja sjúkraflutningstænastuna í Vágunum.

**Játtanin til tey heimleysu verður strikað**
Fíggjarnevndin gongur trivnaðarnevndini á møti, tá hon sigur, at ábyrgdarbýtið millum land og kommunur má fyrst fyrileggja, áðrenn peningur kann játtast til hetta endamálið. Ein samlað virkisætlan fyri heimleys skal eisini fyriliggja, áðrenn peningur verður játtaður til heimleys í Føroyum. Fíggjarnevndin hevur tískil strikað hesa játtan.

Atkvøðugreiðsla varð í Løgtinginum í gjár, týsdagin, um øll hesi málini. Og uppskotið er farið samtykt víðari til triðju og síðstu viðgerð.